FVE FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ
The Faroe Islands Fisheries Inspection



# 1. STÝRIMAÐUR TIL FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ

## 3 avloysarastørv sum 1. stýrimaður við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verða hervið endurlýst.

Trý avloysarastørv sum 1. stýrimaður við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verður hervið lýst leyst, til setan skjótast gjørligt. Størvini eru tíðaravmarkað soleiðis, eitt til 1. mars 2009, eitt til 1. apríl 2009 og eitt til 1. juli 2009.

**Starvið fevnir m. a. um hesar uppgávur**
- Ganga vakt eftir vaktarskipan, sum skiparin fyriskipar.
- Luttaka í dagliga arbeiðinum.
- Arbeiðsuppgávur sambært starvslýsing í Góðsku- og tyrgdarhondbókini.
- Annað fyrifallandi arbeiði

**Førleikakrøv**
- Útbúgving sum skipsførari.
- Vinnubræv sum stýrimaður við handilsskipum á 3. stigi (STCW-regl. II/1 as Watchkeeping Officer).
- Heilsuváttan fyri sjómenn.
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlenskum og enskum máli.
- Stórur dentur verður lagdur á góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa.
- Prógv, so sum frc, eldsløkking, fyrstuhjálp, vinnukavari og onnur ið eru viðkomandi fyri starvið. Fyrimunur er við gildugum prógvum.
- Aldur og heilsu til at gerast vinnukavari. Fyrimunur men ikki krav.

**Setanartreytir**
Størvini eru lønt í 28. lønarflokki eftir lønartalvuni hjá Tænastumannafelaginum. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið. Starvsheiti er 1. stýrimaður.

Tann ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn við CV, avrit av prógvum fyri førleikakrøv og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 3. september 2008 klokkan 12.00.

Umsóknirnar skulu sendast til :

**Fiskiveiðieftirlitið**
**Heykavegur 6**
**Postsmoga 347**
**110 Tórshavn**

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 31 10 65. Henda lýsing er eisini á heimasíðuni www.fisk.fo.

www.fisk.fo

